Skjal C

Til Føroya løgting
Til løgtingsins vinnunevnd

Tórshavn 1. apríl 2019

**Áheitan á Føroya løgting um at virða opinleikan**

Føroysk Miðlafólk heldur tað hava týdning, at Føroyar eru ein tjóð, sum virðir opinleika, gjøgnumskygni og fólkaræði í breiðasta týdningi. Tí vil felagið stríðast ímóti øllum teimum inntrivum, sum skerja møguleikarnar hjá borgarum og fjølmiðlum at hava eftirlit við, hvussu politiska valdið og fyrisitingin umsita veljarans álit.

Føroysk Miðlafólk vil í hesum sambandi vísa á tvey ítøkilig og aktuell mál, har vit sum felag heita á løgtingið um at gera sína ávirkan galdandi.

Løgtingsmál 126/2018 (Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (Brúksskylda, menningarkvotur, rættindi í fiskidagaskipanini og aðrar tillagingar, rættingar og fylgibroytingar)

Sambært lógaruppskotinum ætlar landsstýrismaðurin at seta eina nýggja grein inn í §60, og kemur henda §60 stk. 6 at ljóða soleiðis:

*"Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina er ikki galdandi fyri umsóknir við fylgiskjølum um menningarkvotu."*

Her er talan um at lóggeva beinleiðis ímóti innlitslógini, sum frammanundan hevur ásetingar um verju av privatum, herundir fíggjarligum viðurskiftum hjá einstaklingum.

Føroysk Miðlafólk vil staðiliga ávara ímóti slíkari lóggeving, ið vil skerja gjøgnumskygni í skipanini munandi. Hvussu skal almenningurin kunna viðgera umsóknir og niðurstøður hjá eini metingarnevnd, tá umsóknirnar eru loyniligar? Tvørturímóti má tað vera ein sjálvfylgja, at borgarar og miðlar fáa fult innlit í, hvussu ogn Føroya fólks verður umsitin og útlutað.

Føroysk Miðlafólk heitir tí á løgtingið um ikki at samtykkja nevndu §60 stk. 6 í løgtingsmáli 126/2018.

Annað aktuelt dømi er, hvussu formansskapurin í løgtinginum hevur tikið aftur møguleikan at fáa innlit í, hvussu løgtingslimir brúka tær 30.000 krónurnar, sum tey á hvørjum ári fáa til førleikamenning. Opinleikin má viga meira enn verjan av einstaka tingfólkinum og/ella tey, ið tingfólk keypa tænastur frá fyri almennar pengar.

Føroysk Miðlafólk heita tí á Føroya Løgting um at virða opinleikan og verja fólkaræðið, so borgarar hava fullgóðan møguleika at hava eftirlit við, hvussu skattaborgarans peningur verður brúktur og landsins virði umsitin.

Føroysk Miðlafólk

*Fakta um Føroysk Miðlafólk: Føroysk Miðlafólk vil vera eitt felag fyri øll, sum hava sítt yrki í føroyska miðlaheiminum, og vil eisini vera ein forsprákari fyri góðum journalistikki í einum fjølbroyttum miðlalandslagi. Fremsta uppgávan hjá Føroyskum Miðlafólkum er at verja áhugamálini hjá limunum, men felagið sær tað eisini sum sína uppgávu at vera við til at styrkja og menna føroyska miðlalandslagið. Í nevndini eru Jón Brian Hvidtfeldt (formaður), Øssur Winthereig, Elin Miriamsdóttir, Uni Arge og Beate L. Samuelsen.*